# Brimil til viðgerðar í Landsstýrinum

**–Tað sær ikki út til at vit koma víðari við samráðingum, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður**

*Áki Bertholdsen*



*Enn eru ongi útlit til, at Brimil sleppur til Føroya, men nú verður málið til til umrøðu í Landsstýrinum fyri at vita, hvat skal gerast*

Ósemjan um lønina hjá teimum, sum skulu sigla við Brimli, skal nú leggjast fyri Landsstýrið.

Tað sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður, eftir fundin við yvirmannafeløgini seinnapartin hósdagin.

Stutt sagt, endaði fundurin úrslitaleysur.

– Ætlanin við fundinum var at gera støðuna upp og at útgreina málið, serliga nú Maskinmeistarafelagið hevur fingið nýggjan leiðslu, eftir at Finnleif Guttesen er blivin formaður í Tvøroyrar Býráð.

Niðurstøðan á fundinum var, at feløgini halda fast um síni krøv.

Ásannar tú so nú, at tað ber ikki til at koma longri við vanligum samráðingum?

– Tað sær ikki út til, at tað yvirhøvur ber til at fara undir samráðingar við yvirmannafeløgini, sigur Karsten Hansen.

Hann heldur nevniliga, at tað er ongantíð eydnast yvirhøvur at fáa ílag samráðingar um lønina hjá yvirmonunnum, tí feløgini hava ikki viljað slakað ein tumma.

Karsten Hansen sigur, at sostatt verður málið til upp á fundi í landsstýrinum einaferð í næstum.

So má støða takast til, hvat skal gerast, sigur Karsten Hansen.

Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum, sigur, at púra onki kom burturúr fundinum.

– Fíggjarmálastýrið hevði onki sum helst at bjóða okkum. Fíggjarmálastýrið kom á fund í teirri vón, at vit fóru at slaka. Tað gjørdu vit ikki og tí enaði fundurin úrslitaleysur, sigur Ellintur Abrahamsen

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sum skal reka Brimil, sigur, at hann væntar at fáa eina frágreiðing frá Karsten Hansen um gongdina í samráðingunum. Fyrrenn hann hevur fingið hana, vil hann onki siga.

– Nú gangi eg út frá, at tað ber til hjá Karsten Hansen at staðfesta um tað ber til at koma víðari við samráðingunum, ella ikki. Og ber tað ikki til, mugu vit taka málið upp beinanvegin politiskt, fyri at vita, hvat vit so gera, sigur Jørgen Niclasen.

Tað nýggjasta:

# Tjaldrið fingið undantaksloyvi

**Vaktarskipið Tjaldrið, sum varð lagt hósdagin, hevur nú fingið undantaksloyvi at igla við skerdari manning**

VAKTARHALD OG BJARGING

*Áki Bertholdsen*



*Tjaldrið bleiv lagt hósdagin, men hevur nú fingið undantaksloyvi at sigla, men virksemið verður rættiliga skert*

Í gjáramorgunin fekk Vaktarskipið Tjaldrið undantaksloyvi frá Sjóvinnufyrisitingini at sigla við skerdari manning.

Tað varð greitt, eftir at Tjaldrið varð lagt hósdagin á miðdegi, sum greitt er frá aðrastaðni í blaðnum.

Men síðani hevur Sjóvinnufyrisitingin givið Tjaldrinum eitt nýtt manningarskjal og siglingarloyvi. Tað er skjalið sum sigur, hvussu nógvir mans skulu vera við í minsta lagið fyri at skipið kann sigla trygt.

Og eftir undantaksloyvinum kann Tjaldrið sigla við einum stýrimanni.

Men ymsar treytir fylgja við. Við hesum eina stýrimanninum, kann Tjaldrið ikki vera úti meiri enn í mesta lagi 12 tímar um døgnið. Harumframt hevur Tjaldrið bara loyvi at sigla í »heimasigling«, so vítt , vit hava fingið uppspurt er tað í mesta lagi 30 fjórðingar úr landi. So hóast Tjaldrið sleppur at sigla, verður verður virksemið rættiliga skert.

Á miðdegi í gjár var ikki heilt greitt, nær Tjaldrið loysti, um tað bleiv seinnapartin ígjár, ella í dag.

Ellintur Abrahamsen sigur, at tað er ikki nógv, sum Skipara- og Navigatørfelagið kann gera við hetta.

Men hann heldur, at tað er løgið at sleppa einum bjargingarskipið til havs, samstundis sum kravt verður, at hvør ferja hjá Strandferðsluni skal hava mann við serligari útbúgving, tøkan á brúnni alla tíðina í eini neyðstøðu fyri at sleppa at sigla ímillum oyggjarnar

– Samstundis hevur Sjóvinnuráðið fyri einum ári kravt, at tað skulu vera tveir stýrimenn við, og at tað bara skuldi vera eitt manningarskjal, tvs, at onki serligt skjal skuldi útvegast fyri heimasigling. At Sjóvinnufyrisitingin so broytir manningarskjalið í eini verkfalsstøðu, er heilt burturvið.

# Hetta skal ikki ganga

**– Tað skal ikki ganga, at Skipara- og Navigatørfelagið skal gera av, hvør skal sigla við vaktarskipunum, sigur Jørgen Niclasen. Vit hava fullan rætt at gera, sum vit hava gjørt, sigur Ellintur Abrahamsen**

SÁTTMÁLATRÆTA

*Áki Bertholdsen*



*Hetta góðtaka vit ikki, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður*

– Hetta ber ikki til. At Tjaldrið skal vera lagt, tí at Skipara og Navigatørfelagið vil sleppa at gera av, hvør skal sigla við, tað gongur ikki.

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum er fortørnaður av, at Tjaldrið ikki slapp av stað hósdagin á miðdegi.

Ein av stýrimonnunum er sjúkrameldaður, og Skipara- og Navigatørfelagið vildi ikki loyva nøkrum øðrum stýrimanni umborð enn onkrum av teimum, sum ætlandi skuldu við Brimli.

– Vit hava nakrar stýrimenn, sum ikki eru settir til nakað ávís skip, men sum eru reiðaríðsettir, og sum ætlandi skuldu við Brimli. Og vit vilja bara hava, at teir verða brúktir. Tí hava vit ikki góðtikið, at Vaktar og Bjargingartænastan ætlaði at seta ein annan stýrimann umborð, sigur Ellintur Abrahamsen.

– Tí hava vit noktað øllum øðrum at fara umborð á Tjaldrið, enn teimum, sum skuldu við Brimli. Vit hava nakrar mans, men at reiðaríið ikki vil brúka teir, kunnu vit ikki gera við.

Hann sigur, at teir hava fingið eina lógfrøðiliga meting av støðuna og hon sigur, at felagið hevur fullan rætt at nokta øllum øðrum at taka kansin við Taldrinum, enn teimum reiðarísettu stýrimonnunum, sum ætlandi skuldu við Brimli.

### Kunnu vænta endurgjaldskrav

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sigur, at hetta verður ikki góðtikið.

– Eru vit komin har til, at leiðslan ikki longur skal sleppa at seta fólkið við vaktarskipinum, men at tað skulu verða fakfeløgini, sum manna skipini, eru vit komin út á eitt álvarsligt síðuspor.

Jørgen Niclasen sigur, at eitt er, at Brimil er lagdur. Men at Tjaldrið eisini verður lagt mitt í einum sáttmálaskeiði, tað verður ikki góðtikið og fer ikki aftur við borðinum óátalað, sigur Jørgen Niclasen.

Spurdur, hvat hann meinar við, sigur hann, at hann sigur ikki meiri, enn at hetta verður ikki góðtikið. Annars hevur Skipara- og Navigatørfelagið fingið bræv frá Fíggjarmálastýrinum, har tað verður boðað frá, at Fíggjarmálastýrið heldur, at hetta er sáttmálabrot og at felagið kann vænta sær endurgjaldskrav fyri at hava lagt Tjaldrið.

Ellintur Abrahamsen sigur, at Fíggjarmálastýrið fær onki svar uppá hetta, enn tað er tvætl.



# Hetlendingar seta 50 mió. í Smyril Line



*Nú er nýggja Norrøna helst bjargað, og stjórin á Smyril Line er fegin um hetlendsku íløguna, sum fær avgerandi týdning fyri felagið*

**Shetland Development Trust hevur álit á ætlanini um at byggja nýggju Norrønu og sær stórar møguleikar í øktum samstarvi norðureftir**

SMYRIL LINE

*Eyðun Klakstein*

Hetlendingar eru nú til reiðar at seta eina trivaliga peningaupphædd í Smyril Line, og hetta kann vísa seg at verða bjargingin fyri nýggju Norrønu.

Í gjár fekk Smyril Line boð frá Shetland Development Trust um, at teir eru sinnaðir at seta 50 milliónir krónur í Smyril Line.

Tá Sosialurin tosaði við stjóran í Smyril Line um 10-tíðina fríggjamorgunin, kundi hann einki spennandi siga okkum um ætlanina at hækka partapeningin í felagnum, men ein tíma seinna kom tíðindaskriv frá felagnum um, at nú vóru hetlendingar sinnaðir at seta pengar í felagið.

– Hesir pengarnir verða ein týðandi partur av ætlanini um at styrkja felagið við meira partapeningi, sigur Óli Hammer, stjóri á Smyril Line.

### Kravdu trygd

Týska skipasmiðjan, sum skal byggja nýggju Norrønu, hevur kravt trygd frá Smyril Line um, at felagið er ført fyri at gjalda tær 660 milliónirnar, sum nýggja Norrøna kostar.

Fyrst royndi Smyril Line at fáa landskassaveðhald, men hetta segði landsstýrið kortanei til. Síðani hevur Smyril Line fingið eina freist til 1. februar at skaffa felagnum meira partapening.

Ætlanin var at fáa eini hundrað milliónir krónur afturat í partapeningini, tí tað kann helst sannføra týsku skipasmiðjuna um, at Smyril Line er ført fyri at gjalda fyri nýggja marglætisskipið.

### Menna sambandið

Í Hetlandi eru teir so fegnir um ferjusambandið norðureftir, at teir nú ætla sær at verða beinleiðis uppi í Smyril Line.

– Vit halda, at byggingin av nýggju Norrønu er ein spennandi og lovandi ætlan. Hon kann fáa stóran týdning fyri Hetland, og tí hava vit avgjørt at seta pengar í Smyril Line, sigur Leslie Angus, sum er nevndarformaður í Shetland Development Trust.

– Hetland hevur brúk fyri góðum sambandi til grannalondini, og við hesi íløgu vóna vit, at ferjusambandið við Norrønu kann halda fram og enntá mennast fram yvir, sigur hann.

### Fyrstu ferð uttanlands

Shetland Development Trust er ein grunnur, sum ger íløgur í verkætlanir, sum kunnu menna Hetland á ymsum økjum.

Grunnurin hevur seinastu fimm árini gjørt íløgur fyri næstan 70 milliónir krónur, men hetta er fyrstu ferð grunnurin gera íløtu uttanlands.

– Vit meta ikki føroyingar sum rættiligar útlendingar, tí vit hava nógv samband við tykkum, og vit vóna, at hetta kann halda fram og mennast, sigur formaðurin í grunninum.

– Vit vita, at tað er ein vági við eini hvørjari íløgu, men vit hava gjøgnumgingið ætlanina hjá Smyril Line, og vit trúgva upp á hana, sigur Leslie Angus.

### Fegin stjóri

Óli Hammer, stjóri á Smyril Line, er ein royndur vinnulívsmaður, men tað var ikki sørt, at hann var fegin um hetlendsku íløguna, tá vit tosaðu við hann stutt fyri middag í gjár.

– Eg havi allatíðina trúð upp á, at vit skuldu fara at fóta okkum. Gjøgnum árini hava vit riðið mangan stormin av, og tað gera vit eisini hesaferð, sigur hann.

Nú hetlendingar eru sinnaðir at gera eina stóra íløgu í Smyril Line, sær ljóst út hjá felagnum. Íslendingar eru klárir við 10 milliónum krónum, og Framtaksgrunnurin hevur sagt seg verða sinnaðan at seta pengar í felagið, um aðrir eisini gera tað.

Harafturat arbeiðir Smyril Line í løtuni við øðrum møguleikum, sum Óli Hammer ikki vil siga meira um í løtuni.

### Landsstýrið ikki avgjørt

Higartil størsti partaeigarin í Smyril Line er landskassin, og eisini landsstýrið er biðið um at seta meira partapening í felagið.

– Enn hava vit ikki tikið støðu málið, men tað verður viðgjørt fyrst í komandi viku, og síðani fara vit at geva Smyril Line boð um okkara støðu, sigur Bjarni Djurholm, sum er landsstýrismaður í vinnumálum. Landsstýrið er biðið um at seta 25 milliónir krónur afturat í Smyril Line.

Men hóast landsstýrið sigur nei til Smyril Line, so kann tað eftir øllum at døma ikki kollrenna ætlanina hjá felagnum um at hækka partapeningin við eini 100 milliónum.

# Leggið sjótilbúgving á Tvøroyri

ÚTGERÐARHAVN OG TILBÚGVING

*Jan Müller*

Tað er ikki heilt skeivt at siga, at landasorg ræður í Suðuroynni í hesum døgum, nú eingin útgerðarhavn verður í oynni - í hvussu so er ikki í fyrstu syftu. Flest allir suðuroyingar hava nú í fleiri ár sett sítt álit til, at oljuvirksemi fór at koma til oynna, ikki minst nú arbeitt hevur verið saman við donskum útgerðarfelag. Formaðurin í havnanevndini á Tvøroyri, Heri Mortensen, hevði annars glett seg til at farið til arbeiðis í nýggja árinum við nettupp at taka sær av komandi ætlanunum á Drelnesi. Nú hetta verður av ongum harmast hann og fýlist harðliga at landsstýrinum fyri ikki at hava gjørt nóg nógv til tess, at virksemi kundi koma til Suðuroynna. Heri Mortensen sigur, at oljuvirksemi hevði verið ein góður møguleiki at skapt menning og trivnað aftur í oynni. Men hetta er nú av ongum. – Vit mugu bara standa og hyggja at, meðan karráðir politikarar koyra Suðuroynna av landakortinum. Eingin hevur veruliga fatað, hvussu stóran týdning hetta vildi havt fyri oynna.

Pauli Einarsson, eisini býráðslimur á Tvøroyri og limur í havnanevndini, hevur nú í fleiri ár verið við í arbeiðinum at fáa oljuútgerðarvirksemi til oynna. Hann heldur tað vera skeivt nú at gera Statoil og oljufeløgini til bussimenn. Tað eru okkara egnu politikarar, sum hava ábyrgdina av gongdini, tí tað eru teir, sum hava sett treytirnar. Fyri at bøta um skaðan heldur Pauli Einarsson, at øll sjótilbúgvingin tvs. coast guard/leiting og bjarging eigur at verða løgd í Suðuroynni. – Landsstýrið nýtist ikki at leita eftir hølum til MRCC-støðina í Havn, men kann koma til Tvøroyrar og finna eini høli. Teir skulu vera vælkomnir henda vegin sigur hann. Hetta kemur at geva nógv nýggj arbeiðspláss til oynna.


B36

Shell CUP 2001

B36 bjóðar øllum dreingjum og gentum at gera lið til innandurakapping í fótbólti í høllini á Hálsi fríggjadagin 26. januar og leygardagin 27. januar 2001.

Aldursbólkarnir eru hesir:

| Nr. | Aldursbólkur | Føðiár |
|---|---|---|
| 1. | Gentur 10-12 ár | 1989-1990 |
| 2. | Smágentur 12-14 ár | 1987-1988 |
| 3. | Gentur 14-17 ár | 1984-1986 |
| 4. | Pinkulingar | 1993-1994 |
| 5. | Smápiltar | 1991-1992 |
| 6. | Piltar | 1989-1990 |
| 7. | Smádreingir | 1987-1988 |
| 8. | Dreingir | 1985-1986 |
| 9. | Unglingar | 1982-1984 |

Spælt verður við stórum málum og málmanni. Á hvørjum liði eru 5 leikarar á vøllinum í senn: 4 útileikarar og ein málmaður. Loyvt er at hava ein skiftileikara. Liðini skulu hava fótbóltsnøvn.
Luttøkugjaldið er kr. 200,- fyri hvørt liðið.
SHELL, ið stuðlar kappingini, letur heiðursmerki til trý tey fremstu liðini í hvørjum aldursbólki.

Seinasta freist at boða frá luttøku er týsdagin 23. januar 2001.

Tilmeldingin fer fram hjá umboðsmonnunum við hesar skúlar ella við at ringja:

| Skúli | Umboð | Tel |
|---|---|---|
| Tórshavnar Kommunskúli | Jacob Thomsen | 31 62 29 |
| Venjingarskúlin | Poul Rói Mohr | 31 68 95 |
| Eysturskúlin | Ingi Højsted | 31 75 83 |
| Hoyvíkar skúli | Gunnar Bláberg | 31 77 34 |
| Santa Frans skúli | Kenneth Djurhuus | 31 10 49 |
| Argja skúli | Petur Mortensen | 31 04 10 |

Shell